# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Heðin Stenberg til HB

Føroyameistarnir kunngjørdu um vikuskiftið, at Heðin Stenberg er knýttur at hópinum. HB og AB, har 21 ára gamli málverjin er uppvaksin, hava skrivað leigusáttmála, sum bindir Stenberg at HB í 2011. Hann skal ætlandi loysa Símun Rógva Hansen, sum hevur skift til B71, av. Heðin Stenberg hevur verið nógv darvaður av skaðum seinasta árið. Hann vann sær plássið millum stengurnar hjá AB í 2008 og hevur, sambært faroesoccer.com, spælt 73 dystir fyri barndómsfelagið.



Mynd: hb.fo

## Tað er eingin ivi um, at hetta er mítt besta úrslit nakrantíð

MADS GLÆSNER, SVIMJARI



## Nakað av »fiffið« frá fótbólti kann eisini brúkast í hondbólti, og eitt sindur av skili hevur man hóast alt eisini fyri hondbólti

TRYGVI MORTENSEN, VENJARI HJÁ TJALDRINUM

# Bogi Løkin fer sama veg

**FÓTBÓLTUR** Feðgarnir Abraham Løkin, venjari, og Karl Løkin, leikari, fóru til ÍF undan kappingarbyrjan í ár

Uni Holm Johannesen

Nú fer Bogi Løkin sama veg.

ÍF boðar frá á sínari heimasíðu, at landsliðsleikarin hevur skrivað sáttmála við felagið í Fuglafirði.

Miðvallarin hevur fingið sína uppaling í NSÍ, og hann hevur eisini fingið seg royndan í Frem. Løkin hevur spælt 10 dystir fyri danska felagið.

Bogi Løkin er 22 ára gamal, og hann hevur, sambært faroesoccer.com, spælt 128 dystir fyri NSÍ og skotið 24 mál.

Hann er skrásettur fyri 16 landsdystir og eitt mál fyri Føroyar.

uni@sosialurin.fo




*Ólavur Larsen, ÍF formaður, og landsliðsleikarin Bogi Løkin, sum nú, eins og beiggin Karl og pápin Abraham, eisinii skal umboða ÍF*



# Inter er heimsmeistari

Inter Milan hevur vunnið fyrsta steypið undir leiðslu av Rafael Benitez.

Italiumenninir vunnu lætt á TP Mazembe úr Kongo í finaluni í Club World Cup.

Úrslitið var 3-0. Samuel Eto'o legði upp til fyrsta málið, sum Goran Pandev skoraði. Eto'o økti um leiðsluna, og Joseph Biabiany skeyt seinasta málið.

Kongolesiska liðið vann heilt óvæntað á brasilianska Internacional í hálvfinalinum, men tað var lítið veiggj í teimum í finaluni.

Inter fekk tvey mál tíðliga í dystinum, og tað var ongantíð ivi um, at Benitez fór at vinna sítt fyrsta steyp sum venjari hjá Inter.

uni@sosialurin.fo

# Miðlarnir skriva...

*»Tað vísti seg skjótt, at Heðin Stenberg var ein málmaður sum vit fingu 'gott eyga á'. Heðin hevur hóast sín unga aldur, verður knýttur at besta liðnum hjá AB síðani 2007. Vit í pf. Havnar Fótbólti eru sera spentir uppá at síggja Heðin í HB, og væntað vit eina javna og harða kapping um málmansplássið á besta liðnum.«*

**www.hb.fo**

*"Samanumtikið hava kyndilskvinnur flestu dystirnar í ár staðið seg sera væl, men eru dagarnir slakir og tendringin ikki heilt í topp, so er munur at síggja ímóti liðum sum t.d. Neistanum og Tjaldrinum, serliga tí hesi lið hava stórskjúttar at skjóta flestu málini."*

**www.kyndil.fo**

*»Sum útgangspunkt er tað væl altíð at fegnast um, at Pál yvirhøvur er í finaluni. Vit síggja jú hvussu londini stríddist um at fáa fólk í finaluna, summi tí at onnur vóru har av óróttum, og onnur til at halda sín innanfyri alíkavæl. Finalupláss er ikki krav til at kunna vinna heiðursmerki, men tó ein týðandi fyrimunur.«*

**www.svimjing.com**